# Halloween á Húsarhalds-skúlanum

**Nú ein dagin stukku Britney Spears, Michael Jackson, Pamela Anderson inn á gólvið og í gjár hildu tær Halloween í besta amerikanska stíl. Nei, hugflogið hjá gentunum á Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík feilar onki, nú árligu evnisdagarnir standa á tímatalvuni**

EVNISVIKA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ormagrýta við grønum larvum, gulum tonnum, blóðeggum og frystum heila omaná. Ljóðar kanska ikki so freistandi, men væl smakkaði vildu genturnar á Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík verða við, tá tær í gjár borðreiddu við hesum forvitnisliga Halloween-døgurða. Og skuldi onkur ikki verið komin í rætta Halloween-huglaði var bara at fara inn í Halloween-skrýddu stovuna, har svørtu veggirnir og ovurstór eiturkoppaspinn nokk skuldu syrgja fyri, at óhugnin breiddi seg.

## Evnisdagar

Serligi Halloweendagurin var liður í árligu evnisdøgunum sum hava staðið á tímatalvuni á Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík hesar dagarnar. Sigast má, at næmingarnar hava latið hugflogið reika víða bæði í tíð og stað við bæði Indianara-degi, Hollywood-degi og mín sann eisini einum UFO-degi. Á Hollywood degnum komu ongi minni enn Elvis, Justin Timberlake, Britney Spears og Pamela Anderson spákandi eftir reyða leyparanum, og til UFO løtuna vóru allir næmingarnir klæddar út, sum rættar UFO verur við bert trimum fingrum!

Hóast hugflogið spælir ein stóran leiklut á evnisdøgunum, skal skil verða í. Dagarnir skulu nevniliga enda við eini uppgávu um, hvussu matur og annað var gjørt, og tá verður so mett um, um næmingarnir nú eisini hava brúkt tað, tær hava lært á skeiðnum.

Skeiði á Húsarhaldsskúlanum endar 24. februar. Tá verður farið undir at leggja eina ætlan fyri skeiðini í summar, sum øll hava høvi at tekna seg til.



*Inni í Halloween-stovuni breiddi óhugnin seg frá ovurstórum eiturkoppaspinnum og svørtu veggunum*

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Fisheries and Maritime Affairs




## LIVRADAGAR Í ÚTVARPSHØLLINI

**Endamálið við fundinum er at kunna um, hvussu skipanin við livradøgum fer at virka, og hvussu tillutingin av eyka fiskidøgum fer fram eftir kunngerð nr. 1 frá 3. jan. 2006. Kunnað verður um framleiðslu úr livur og møguleikum fyri at nýta meira av teimum pørtunum av fiskinum, sum vanliga ikki verða nýttir til matna ella verða tveittir burtur. Spurningurin um gagnnýtslu av innvølum verður viðgjørdur út frá einum breiðum sjónarmiði um burðardygga veiðu, fiskiskapi við ábyrgd og etiskum hugleiðingum, og greitt verður frá, hvussu altjóða rákið kann ávirka okkum.**

**Mikudagin 1. februar 2006, kl. 13.00-17.00 í Útvarpshøllini.**
Tiltakið er ókeypis, men ynskiligt er at boðað verður frá luttøku frammanundan á telefon 353030 ella við telduposti annak@fisk.fo.

**Kl. 13.00 Bjørn Kalsø,** landsstýrismaður, bjóðar vælkomin

**13.10-13.20 Egil Olsen, stjóri.**
Greiðir frá royndunum hjá Faroe Marine Biotech á Eiði.

**13.20-13.40 Helgi Nolsøe,** leiðari fyri Granskingarkjarnuni fyri framleiðslutøkni.
Royndir við ymiskum hættum at taka livur í Føroyum.

**13.40-14.00 Hóraldur Joensen,** leiðari fyri Granskingarkjarnuni fyri lívtøkni.
Um aðra „hjávøru" enn livur.

**14.00-15.00 Hvat gera vit, og hvat síggja vit fyri okkum í hesum.**
Stutt innlegg frá 5-6 fólkum úr vinnuni.

**15.00-15.30 Kaffi**

**15.30-16.00 Rógvi Reinert,** aðalstjóri í Fiskimálaráðnum.
Gjøgnumgongur kunngerðina um livradagar.

**16.00-16.20 Guðrið Andórsdóttir,** góðskuleiðari á Faroe Seafood.
Rákið uttanífrá og økta trýstið frá umheiminum.

**16.20-17.00 Orðaskifti/kjak. Herálvur Joensen,** sendimaður.

www.fisk.fo